## Tøgn í svartkjafta-flotanum

FISKIVINNA
Vilmund Jacobsen

Hóast málið um hjáveiði uppi í veiðini hjá stóru svartkjaftatrolarunum afturvendandi hevur verið frammi í fjølmiðlunum eina tíð, hevur einki verið at sæð ella hoyrt um, hvat teir, sum eiga hesi skip - ella teir, sum sigla við teimum - siga um hesi viðurskifti.

Her hevur valdað tøgn.

Hvat tøgnin merkir, er torført at siga, men hon nýtist ikki at merkja nakað sum helst.

Ofta er tað tó so, at tann, sum er fyri "órætti", hevur hug at siga okkurt - ella gera viðmerkingar til tað, sum er frammi - um hetta er út vón og viti.

Fiskiveiðieftirlitið hevur kannað veiðina hjá svartkjaftatrolarunum, tá ið skipini hava landað, men sum skilst, staðfesti eftirlitið ikki tær stóru nøgdirnar av øðrum fiskasløgum.

Sum skilst, gjørdi Fiskiveiðieftirlitið hesar kanningar í fjør heyst, men tá segði Elmar Højgaard, leiðari á eftirlitinum, at neyðugt varð at taka kanningarnar uppaftur, tá ið meira svartkjaftur aftur var at fáa í føroyskum sjógvi.

Svartkjaftaveiðan í føroyskum sjógvi var heldur vánalig í seinnu helvt av 2004.

Seinastu tíðina hava skipini roynt á syðru leiðunum - og heilt har suðuri á Írlands-leiðunum, men sum tíðin gongur, tekur svartkjafturin seg norður hendanvegin.

Spennandi verður at frætta, hvat úrslitið av kanningunum hjá Fiskiveiðieftirlitinum verður, tá ið svartkjafturin seinni í vár aftur verður í føroyskum sjógvi.

Ein annar møguleiki hjá myndugleikunum, um teir vilja kanna møguliga uppíblanding út í æsir, er, at fólk verða send umborð á skipini, tá ið tey koma í føroyskan sjógv av royna.



- Svartkjaftaflotin hevur stóran týdning fyri alt samfelagið. Tó eiga vit at fáa greiði á, hvussu støðan er við hjáveiðini av øðrum fiskasløgum, heldur Bill Justinussen, løgtingsmaður

# Bill spyr um hjáveiði hjá svartkjaftaflotanum

**Løgtingsmaðurin, Bill Justinussen, spyr nú Bjørn Kalsø, landsstýrismann, um tað kann hugsast, at samband er millum miðalstøddina á upsa og svartkjaftaveiðina**

FISKIVINNA
Vilmund Jacobsen
vilmund@sosialurin.fo

Spurningurin um møguliga uppíblanding av upsa og toski í svartkjaftaveiðini er nú aftur settur á dagsskránna.

Tað var ein partrolaraskipari, sum mánamorgunin setti seg í sambandi við Sosialin, ið helt, at sjóneyka átti at verið sett á spurningin um hjáveiðina hjá svartkjaftatrolarunum.

### Bill spyr Bjørn

Longu sama dag, sum blaðið er dagfest, boðar løgtingsmaðurin, Bill Justinussen, frá, at hann fer at seta fiskimálaráðharranum, Bjørn Kalsø, munnligan fyrispurningi um hesi viðurskifti.

Spurningarnir hjá løgtingsmanninum eru í tríggir í tali.

Í fyrsta lagi spyr hann, um landsstýrismaðurin kann upplýsa fyri tinginum, hvussu stór hjáveiðan í svartkjaftinum er.

Í øðrum lagi, um landsstýrismaðurin metir, at samband er millum miðalstøddina á upsastovninum og svartkjaftaveiðina.

Í triðja og seinasta lagi spyr løgtingsmaðurin, um landsstýrið hevur ætlanir um at seta tiltøk í verk í sambandi við hjáveiðina hjá svartkjaftatrolarunum.

### Størri hjáveiða

Í viðmerkingunum til fyrispurningin, vísir Bill Justinussen á, at landsstýrismaðurin á tingsins røðarapalli í sambandi við annan fyrispurning um hesi viðurskifti hevur upplýst, at metta hjáveiðan hjá svartkjaftaflotanum undir Føroyum lá millum 0,2 og 0,3%.

- Men síðan hevur av og á verið frammi, at hjáveiðan helst er munandi størri enn nevnda prosenttal.

Løgtingsmaðurin vísir eisini á, at íslendingar - orsakað av vandanum við hjáveiði - ávísar tíðir av árinum hava leiðir stongdar fyri at geva øðrum fiskasløgum frið.

- Nú rópar aftur ein royndur skipari varskó. Hann vísir á, at síðani svartkjaftaveiðan veruliga tók dik á seg, hevur miðalstøddin serliga á upsa verið støðugt minkandi. Skiparin heldur, at samband møguliga er millum hesi bæði nevndu fyribrigdi.



*Bill Justinussen, løgtingsmaður, hevur nú sett Bjørn Kalsø, landsstýrismanni, munnligan fyrispurning um uppíblanding av øðrum fiskasløgum í svartkjaftaveiðini*

### Gagna øllum

Og Bill Justinussen heldur fram:

- Skiparin vísir eisini á, at tað ikki skal skiljast sum misnøgd við svartkjaftavinnuna, sum jú er verulig innløga fyri føroyska samfelagið. Hann heldur hinvegin, at um vit fáa veruligu tølini á borðið, fer hetta at gagna øllum bólkum - eisini teimum, sum eru í svartkjaftavinnuni.

Í viðmerkingum sínum sigur løgtingsmaðurin seg eisini hava frætt, at landsstýrið hevur havt eygleiðara umborð á onkrum svartakjaftaskipi í eini roynd at fáa greiðu á støðuni við hjáveiði.

- Tó havi eg ikki hoyrt nakað alment um hesi úrslit, sigur Bill Justinussen, løgtingsmaður.